F B F
Jesu rødd her ljóðar, hann kallar enn í dag,
F G C
frelsuna hann bjóðar heilt uttan viðurlag.
F B F
Nú er alt til reiðar, og nú er frelsan nær,
F C F
Jesus teg spyr nú: “Vilt tú fylgja mær?”

F B F
Vilt tú vera við? Vilt tú vera við
F G C
í tí ungdómsskara, sum fríur fer avstað,
F B F
fylgir Kristi eftir í hans ferðalag,
F C F
Jesus teg kallar, vilt tú vera við?

Akurin er staðin, men fáir arbeiðsmenn,
vakna, brúka dagin, hví gert tú einki enn?
Mong í vanda bíða, kom, nú til verka far.
Jesus teg spyr nú: “Vilt tú fylgja mær?”

Jesus brátt vil savna til sína dýrd øll tey,
frelsuboð ei havna, men gera, sum hann beyð.
Ert tú nú til reiðar, o, gev tó honum svar.
Jesus teg spyr nú: “Vilt tú fylgja mær?”

Eg vil vera við, eg vil vera við
í tí frelsta skara, sum fríur fer avstað,
fylgir Kristi eftir í hans ferðalag,
Jesus eg svari: “Eg vil vera við!”

Vilhelm Munk yrkt
Johs. Mortensen týddi